ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.



## Sethús og stórt grundøki Yviri við Strond 57

Um hóskandi boð fæst, verður ognin matr. nr. 659 a, Tórshavn, seld.

Talan er um eina serstaka ogn, ið liggur ógvuliga væl fyri við fríum útsýni yvir fjørðin og Nólsoynna. Partur av grundøkinum er plantað við m.a. stórum trøum. Økið omanfyri húsini er bøur. Umframt sethúsini er á økinum hjallur og gamalt fjós við laðaðari grund.

Grundøkið er 3.057 m².

Húsini, sum eru bygd í 1956, eru í tveimum hæddum, hvør 136 m², alt innrættað. Í erva: Gangir, baðiverilsi, køkur, tvær stovur, hjúnarúm og trý kømur. Í kømrum og gangi eru innbygd skáp. Kjallari: Gangir, stór stova, trý kømur, wc/brúsa, fýrrúm, vaskikjallari, kjallararúm og goymsla. Fleiri innbygd skáp eru í niðaru hæddini.

Prísuppskot kr. 3.300.000,00.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til undirritaðu. Sí eisini heimasíðu okkara.

**Advokatskrivstovan**
Tel. 353335
att: Fríða Patursson, adv. frp@jura.fo ella
skrivaran Maibritt Johannessen, maj@jura.fo

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

## Epileptikarafelag Føroya

Aðalfundurin 2008 verður hildin í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10c, Tórshavn.

**Týsdagin, 2. desember 2008 Kl. 19.00**

Skrá sambært lógum felagsins.

Jóhanna Andreasen, menningarsjúkrarøktarfrøðingur á Psykiatriska deplinum, kemur at tosa um mentalar forðingar.

Kaffi og rísalamand verður eftir fundin.

**Nevndin**

## Starv til Sosialudeild hjá Porkeris- og Vágs Kommunu

**Kundi tú hugsa tær at havt ávirkan á arbeiðið í barnaverndar-og sosialum viðurskiftum í Porkaris- og Vágs kommunu?**

Porkeris- og Vágs kommuna hava samtyk at seta barnaverndar- tænastu á stovn, ið kemur at liggja undir Sosialu-deild hjá Porkeris- og Vágs kommunu, ið er í Porkeri. Tí verður søkt eftir málsviðgerða til hesa tænastu.

**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, ella hevur tú aðra hóskandi sosiala ella aðra í minsta lagi miðallanga útbúgving, innan heilsu-, og almanna- ella skúlaverkið og hevur tú hug til sosialt arbeiði og hevur góðar samstarvseginleika, dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ynskir at ger mun, so er tað tær vit leita eftir.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og í seinasta lagið 5. januar 2009. Arbeiðið er fulla tíð og verðu lønt sambært sáttmála millum Kommunal Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

**Fleiri upplýsingar**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, leiðara á Sosialu Deild tlf. 37 36 04 ella 22 67 04.

Umsóknin við prógvum, CV og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu Deild att.: Anna Djurhuus í seinasta lagi 28 .november 2008 kl 12.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
**Við Á 8 · 950 Porkeri**
**Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04**
**T-post: sosialadeild@email.fo**



## Chevrolet Lacetti 1.4 til sølu

Svartur Chevrolet Lacetti frá 09/07. Hevur koyrt 12.000 km. Til sølu vegna flyting. Er roykfríur.

Hevur el-rútar, aircondition, stereoanlegg stýrt frá rattinum.

Píkadekk á felgum fylgja við.

**Nýprísur: 174.000,-** **Prísuppskot: 120.000,-**

**Tlf. 42 25 26 / 22 08 03**

**Miðnámsskúlin í Suðuroy**

## Húsavørður

### til Skúladepilin í Suðuroy

Treytað av játtan á løgtingsfíggjarlógini fyri 2009, verður søkt eftir húsvørði at byrja á nýggja Skúladeplinum í Suðuroy tann 1. desember 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Arbeiðsuppgávur umfata alt vanligt húsavarðaarbeiðið, eitt nú:**
- hava umsjón við og røkja innbúgv
- hava umsjón við og røkja bygningin og uttandura økið hjá skúlanum
- hava umsjón við tøkniligum inleggingum, hita-, vatn-, ventilatión-, el- og øðrum skipanum
- hava ábyrgd av, at skúlin verður upp- og afturlatin sambært avtalu við leiðslu skúlans
- at skúla- og serstovur eru í lagi, tá undirvísingin byrjar
- hava ábyrgd av reingerðini í skúlanum; herímillum at vera við til at seta og hava umsjón við reingerðarfólki og handverkarum, ið arbeiða á skúlans øki
- at rigga til høli í sambandi við próvtøkur og onnur tiltøk, og vera til handa kring virksemi skúlans; eisini eftir vanliga arbeiðstíð

**Vit vænta, at tú:**
- ert handverkari ella hevur samsvarandi útbúgving
- hevur telduførleika á brúkarastigi
- hevur evni at skipa fyri
- trívist at vera saman við ymiskum aldursbólkum
- ert áhugaður í at arbeiða við nýhugsan viðv. umhvørvisvinarligari umsiting av bygninginum í sambandi við reingerð, renovatión v.m.
- hevur góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
- eitt fjølbroytt og spennandi starv
- eitt øðrvísi skúlaumhvørvi við nógvum avbjóðingum
- eitt arbeiðspláss í støðugari broyting og menning

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Umsókn:**
Umsóknir við prógvum, váttanum og/ella viðmælum fyri arbeiðsroyndir skulu stílast til Skúladepilin í Suðuroy, Att. Ole Laursen, deildarleiðara, men sendast til Miðnámsskúlan í Suðuroy, Postboks 130, 900 Vágur. Umsóknin skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi týsdagin 25. november 2008.

Einkjur og einkjumenn við ómyndigum børnum, hava aftur í ár høvi at søkja Einkjugrunn Føroya um fíggjarligan stuðul.

Umsóknarblað fæst við at venda sær til Eik Banka P/F, Stjórnarskrivstovan, tlf. 348 000, fax 348 800 ella á teldupostadressu: stj.skr@eik.fo

Freistin at søkja er 1. desember 2008.

**Einkjugrunnur Føroya**

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir